# ARB-Vegleiðing

# V-E014-1

**Vandin fyri at verða smittaður av fuglakrími.**

**Fyrstu fer útgivin: 2006/03**
**Seinast dagførd:**

# Arbeiðseftirlitið

## Hvat er ein ARB-Vegleiðing?

ARB-vegleiðingar vegleiða um hvussu reglurnar í arbeiðsumhvørvislógini skulu skiljast/tulkast. ARB-vegleiðingar verða brúktar til at:

- greina út orð og setningar í reglunum (lóg og kunngerðir),
- greiða frá hvussu krøvini í reglunum kunna lúkast í royndum,
- greiða frá vitan um tulkingar av reglunum í samband við dómar,
- greiða frá hvussu arbeiðsumhvørvislógin er samansett og hvørji øki hon umfatar.

## Er ein ARB-vegleiðing bindandi?

ARB-vegleiðingar eru ikki bindandi fyri virkir, trygdarskipan e.o., men vegleiðingarnar eru skrivaðar út frá reglum (lóg og kunngerðum), sum eru bindandi.

Arbeiðseftirlitið setir ikki onnur krøv, um t.d. eitt virki hevur gjørt sum tilskila í eini vegleiðing.

Virkini kunna loysa uppgávurnar á annan hátt, men Arbeiðseftirlitið vil tá meta um, um hesin háttur er líka so tryggur og í trá við reglurnar.

**Arbeiðseftirlitið**
**Boks 1134**
**FO-110 Tórshavn**
**Tlf.: + 298 357811**
**Fax.: + 298 357810**
**T-post.: arb@arb.fo**
**Heimasíða: www.arb.fo**

Arbeiðsfólk, sum eru umfataði av arbeiðsumhvørvislógini, kunnu í samband við útinnan av arbeiði koma út fyri at taka deyðan ella sjúkan flogfenað upp. Nú tað sonevnda fuglakrímið ger um seg víða hvar og smittan breiðir seg, er tað ikki útilokað, at føroyskur flogfenaður eisini kann fáa smittuna.

Í tí sambandi eiga arbeiðsfólk at vísa varsemi, tá flogfenaður verður tikin upp, um illgruni er um fuglakrím.

Arbeiðseftirlitið hevur ikki í síni lóggávu beinleiðis ásetingar um slíkar vandamiklar arbeiðsstøður og av somu orsøk er eingin føroysk leiðbeining hjá arbeiðsfólki at nýta, sum greitt tilskilar, hvussu farast skal fram, fyri at verja seg móti møguligum smittuvanda.

Ásannandi tað íkomnu støðu, hevur Arbeiðseftirlitið gjørt av, at gera leiðbeining í samband við útinnan av arbeiði, tá tað snýr seg um, at arbeiðsfólk kemur ella kann koma í samband við sjúkan ella deyðan flogfena.

Sambært kunngerð nr. 9 frá 13. februar 2002 um útinnan av arbeiði § 28, kann stjórin fyri Arbeiðseftirlitið gera leiðbeiningar fyri útinnan av arbeiði, m.a. serlig vælferðartiltøk og slík onnur arbeiðsumhvørvistiltøk, sum eru neyðug at fyribyrgja sjúku o.l.

Við heimild í hesi áseting, hevur stjórin fyri Arbeiðseftirlitið gjørt av, at nýta “Retningslinjer ved udbrud af fugleinfluenza” at galda sum leiðbeining í samband við útinnan av tílíkum arbeiði í Føroyum.

Nevndu donsku “Retningslinjer ved udbrud af fugleinfluenza” eru leiðbeiningar, sum danska Arbejdstilsynet hevur latið gjørt og nýtir í sínum átaki at tryggja arbeiðsfólkið í samband við vandan fyri fuglakrími.

Danska leiðbeiningin skal skiljast á tann hátt, at har tað verða nevndir danskir myndugleikar ella Danmark, so er tað ávikavist føroyskir myndugleikar og Føroyar, ið meint verður við.

Avgerð um at nýta hesa leiðbeining, er tikin í samráð við Deildin fyri Arbeiðs- og Almenna heilsu, eins og leiðbeiningin ikki á nakran hátt er í andsøgn við tær tilráðingar, sum eru komnar frá danska heilsustýrinum.

Av tí at danska leiðbeiningin verður regluliga dagførd, verður altíð tann nýggjasta dagføringin tøk at heinta á Arbeiðseftirlitinum, ella at umbiðja haðani, eins og leiðbeiningin eisini verður tøk at heinta á heimasíðuni hjá Arbeiðseftirlitinum

**Arbeiðseftirlitið**, 22. mars 2006

________________________

Karl Joensen, stjóri (sign.)